


# Suzuki Swift til evropearar

*Nýggi Swift er á leið í somu støðd sum forgangarin, men er bæði hægri, breiðari og munandi rúmligari*

**Suzuki Swift er nú komin á marknaðin í nýggjum hami, og tað er ikki hissini hamur ið er lagdur uttan um alla ta nýggju Suzuki-tøknina. Hann er bæði smartur og »frekkur« í útsjónd. Designið er beinleiðis til europearar. Swift verður gjørdur við trimum og fimm hurðum**

BILAR

Suzuki er mest seldi bilur í Føroyum higartil í ár, eins og hann eisini er ein bestseljari í Danmark. Nú eru teir so komnir á marknaðin við einum nýggjum Suzuki Swift, og sum altíð er Johs. Berg fyrst við tí nýggjasta. Føroyar verða nevniliga millum heimsins fyrstu lond at seta gongd á søluna av nýggja Swift.

Fyrstu ferð Swift kom á marknaðin var í 1983, og hevur hann verið á marknaðinum til fyri kortum. Onkrar smærri broytingar hava verið millum ár og dag. Nú kom so endiliga ein heilt nýggjur Swift, ið er designaður beinleiðis til evropeiska marknaðin.

Bilurin er bygdur yvir konseptbilin Concept-S2, ið var sýndur fram á fleiri altjóða bilaframsýningum í fjør.

Nýggi Swift er á leið í somu støðd sum forgangarin, men er bæði hægri, breiðari og munandi rúmligari. Eisini aksilfrástøðan er longri.

Bilurin hevur annars einki við forgangarin at gera. Alt er betri, bæði kvaliteturin og trygdin eru nú á munandi hægri støði, serliga kvaliteturin í kabinuni. 6 airbag eru nú standard, eins og t.d. koyritelda, fløguspælari ið kann stýrast við knøttum á rattinum, og 15" hjól. Koyrieginleikarnir eru fult á hædd við tað, vit kunnu vænta av einum nútímans bili til evropeiska marknaðin.

Swift fæst við tveimum ymiskum bensinmotorum: 1,3 litur við 92 hk og 1,5 litur við 102 hk. Av standardútgerð kunnu vit m.a. nevna ABS bremsur við EDB, 6 airbag, elektriska servostýring, el-síðurútar, el-síðuspegl við hita, og innbygt radio við fløguspælara, ið kann stýrast frá rattinum.

Swift verður í fyrsta umfari gjørdur sum hatchback við trimum og fimm hurðum.

Komandi ár kemur ein Swift í sportsútgávu, og um tvey ár kemur eisini ein cabriolet á marknaðin. Seinni kemur eisini ein dieselútgáva.

Prísirnir byrja við kr. 139.990 fyri ein Swift við 3-hurðum og 1,3 litur motori.

Satt at siga líkist hetta einum vinnara í flokkinum.

SUZUKI

## Suzuki Swift 1,5 Hatchback 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,5 litur 4 syl. bensin 102 hk |
| 0-100 km/t | 10,0 sek |
| Bensinnýtsla | 15,4 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 185/60-15 |

**Stødd og vekt**

| | |
|---|---|
| Longd | 369,5 cm |
| Breidd | 169,0 cm |
| Hædd | 150,0 cm |
| Eginvekt | 950 kg |
| Viðførisrúm | 213 litrar |
| | |
| Prísur | kr. 154.990 |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313535 |



*Kvaliteturin og trygdin eru nú á munandi hægri støði, serliga kvaliteturin í kabinuni, 6 airbag eru nú standard*




*Suzuki Swift verður í fyrsta umfari gjørdur sum hatchback við trimum og fimm hurðum*